# Bókakafé á Býarbókasavninum

# November 2017



### 1. Chris Stewart: Citroner på vejen – en optimist i Andalusien (2000) – 267 síður

Á flógvan hátt sigur eingilskmaðurin Chris Stewart frá upplivingum sínum og tilveruni, tá hann og konan koma undir at keypa ein niðurdotnan garð í Andalusia og saman við bygdarfólkinum byggja garðin uppaftur.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 2. Jacob Wendt Jensen: Nina van Pallandt – Hellere tro på det gode en gang for meget (2012). Ævisøga – 333 síður

Duo'in Nina & Frederik gjørdist kend í 1957. Her er dramatiska lívssøgan hjá Ninu (f. 1932), um trygga barndómin, spennandi lívið sum tónleikari og fylgjandi árini upp- og niðurtúrum. Bókin hevur eisini nógvar myndir frá tíðini.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 3. Birita Michelsen: So normal og tó ikki (2016) – 110 síður

Birita Michelsen (f. 1985) fekk staðfest vælfungerandi infantila autismu, tá hon var 20 ár. Í bókini greiðir hon frá, hvussu hon megnar gerandisdagin, hóast almenna skipanin ikki altíð er til reiðar at lofta fólki, sum hava persónligar avbjóðingar.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 4. Mitch Albom: The five people you meet in heaven (2003) – 231 síður

Tá 83 ára gamli Eddie doyr í eini vanlukku, vaknar hann aftur í eftirlívinum, har hann finnur útav, at himmalin ikki er eitt paradís, men heldur eitt stað, har fólk frá lívi tínum greiða tær frá meiningini við lívi tínum. Kann eisini lænast á donskum.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 5. Mitch Albom: En dag mere (2007) – 172 síður

Hvat hevði tú gjørt, um tú kundi fingið bara ein dag afturat saman við einum, sum doyði frá tær? Ein ríkandi og jalig bók um kærleikan millum børn og foreldur, og um at fyrigeva, eisini sær sjálvum.

________________________________________________________________________________

________________________________________________________________________________

### 6. Fredrik Sjöberg: Rosinkongen (2014). Ævisøga um Gustaf Eisen – 227 síður

At síggja til hevur rithøvundurin skrivað eina ævisøgu um svenska vísindamannin Gustaf Eisen (1847-1940), sum m.a. granskaði reyðmaðkar og lærdi seg alt um drúvur, vín og rosinur. Men sum í einari vanligari samrøðu fer rithøvundurin javnan út á síðuspor, har hann millum annað hugleiðir undirhaldandi um gøtulyktir og sitróntrø.

________________________________________________________________________________

________________________________________________________________________________

### 7. Henri Nissen: Hans Berntsen – Volvo-direktøren, som helbreder tusinder med Helligåndens kraft (2017). Ævisøga – 183 síður

Fyrst í 1980'unum hevði Hans Berntsen (f. 1955) eina rættiliga vanliga tilveru. Men ymiskar ógvusligar hendingar rundan um familjuna høvdu við sær, at hann gjørdist aktivur í einari meinigheit og við tíðini kom at grøða fólk í øllum kongaríkinum, eisini í Føroyum.

________________________________________________________________________________

________________________________________________________________________________

### 8. Vigdis Hjorth: Arvur og umstøður (2016) – 350 síður

Tá pápin doyr, stingur eitt arvastríð seg upp millum fýra systkin og mammu teirra. Ein av systkjunum, Bergljót, og beiggin hava kvett sambandið við familjuna fyri nógvum árum síðani, tí hon var vorðin kynsliga misnýtt av pápanum, men restin av familjuni vil ikki trúgva tí, sum er hent.

________________________________________________________________________________

________________________________________________________________________________

### 9. Caroline Albertine Minor: Velsignelser. Stuttsøgur (2017) – 237 síður

Sjey vakrar og rørandi stuttsøgur um sorg og tómleika, og um at missa, men eisini um at finna troyst og signing. Í stuttsøgunum hitta vit ungar kvinnur í 20'unum, sum vála gjøgnum lívið uttan at finna eina ávísa kós. Hóast evnið er tungt, er bókin vælskrivað og løtt at lesa.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 10. Svetlana Aleksijevitj: Secondhand-tid (2016) – 541 síður

Ein breiður skari av russum greiðir frá sínum Russlandi og hvussu tey uppliva Russland eftir at Sovjetsamveldið fall, og eisini eru frágreiðingar frá ungum, sum ikki kenna til annað. Um nostalgi, samleika, vónbrot, dreymar og framtíðarvónir – ein vangamynd av russisku fólkasálini í dag.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 11. Dag Solstad: Generthed og værdighed (2000) – 187 síður

Satirisk og samfelagskritisk skaldsøga um ein miðaldrandi norskan studentaskúlalærara, sum knappliga gerst sansaleyst í øðini framman fyri næmingunum, av tí at hann ikki fær sligið regnskjólið út. Meðan hann gongur og melur í regninum hugsar hann aftur á sína lestrartíð og sítt hjúnaband.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 12. Tove Ditlevsen: Gift (1971) – 140 síður

Endurminningar, har Tove Ditlevsen minnist aftur á síni trý fyrstu hjúnabond og um rúsevnismisnýtsluna, hon kom út í, inntil hon aftur gjørdist før fyri at skriva.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 13. Dorthe Nors: Spejl, skulder, blink (2017) – 190 síður

Sonja er støk og hevur búð í Keypmannahavn, síðan hon var ung. Hon er upprunaliga av bygd. Nú er hon í 40'unum og roynir at taka koyrikort, men tað er ringt at skifta gear. Samstundis kennir hon seg ikki heima í sínum egna lívi langt burtur frá familju og sínum uppruna.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 14. Sidsel Falsig Pedersen: Hestens fødselsdag (2015) – 116 síður

Hon hevur júst mist arbeiðið, tí hon beit stjóran hjá sær. Hon er júst farin frá sjeikinum og byrjar at gera reint á Bakkanum. Ein dagin finnur hon eina brosju, sum onkur hevur mist.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 15. Joseph Conrad: Hjarta myrkursins (1899) – 136 síður

Søgan fer fram í Congo, tá hjálandaveldini vóru í hæddini í 19. øld. Frásøgumaðurin, Marlow, ger eina ferð niðan eftir Congoánni fyri eitt belgiskt handilsfelag. Djúpt inni í landinum hittir hann tann gátuføra Kurtz, sum er fílabeinshandlari og onkursvegna hevur fingið støðu sum gudur ímillum íbúgvarnar har á leiðini.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 16. Gordon, Noah: Helbrederen (1. útg. á donskum 1994) – 705 síður

Rob J. Cole blívur foreldraleysur í London í 1021, tá svartideyði herjar. Han kemur í læru hjá einum ferðandi, sum selur undurviðgerðir til fólk. Tað vísir seg, at Rob hevur gávur til at lekja, og hann ferðast allan vegin til Persiu fyri at fáa sær útbúgving sum lækni.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 17. Ivey, Eowyn: Snebarnet (2013) – 448 síður

Tilkomna parið Mabel og Jack er niðursetufólk í Alaska í 1920. Lívið í oyðimørkini er hart, og tað nívir tey, at tey eru barnleys. Til stuttleika byggja tey eitt kavabarn, og dagin eftir er kavabarnið horvið, samstundis sum ein lítil genta fer at vísa seg í nánd av húsinum.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 18. Musso, Guillaume: Opkald fra en engel (2016) – 409 síður

Á JFK-flogvøllinum í New York bresta ein maður og ein kvinna saman, og við eitt mistak skifta tey um fartelefonir. Hetta uppdaga tey ikki, fyrrenn hann er í San Francisco og hon í Paris.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 19. Palacio, R.J.: Undur (2017). Ungdómsbók – 430 síður

August er føddur við einum andlitsfráviki, sum higartil hevur forðað honum í at gingið í vanligum skúla. Í grundini er August bara ein vanligur drongur við einum heilt serligum andliti. Men klárar hann at sannføra sínar nýggju floksfelagar um, at hann er akkurát sum teir uttan mun til, hvussu hann sær út?

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 20. Sølvsten, Malene: Ravnenes hvisken (2016). Ungdómsbók – 706 síður

Norðurlendsk fantasy-noir/krimi-bók. Anna sær fyri sær, at ein reyðhærd genta verður dripin og ein rún verður skorin í ryggin. Stutt eftir eru fleiri morð í økinum. Bara reyðhærdar gentur, og allar hava somu rún á rygginum.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 21. Toews, Miriam: Små udsving : historien om min far (2014) – 212 síður

Søgan snýr seg um Melvin Toews (pápa rithøvundin), sum hevði eitt bipolart sinnisbrek og beindi fyri sær sjálvum, tá hann var 62 ár.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________